# Signar á Brúnni 65 ár



Mikudagin 10. februar fylti Signar á Brúnni í Fuglafirði 65 ár. Hann er vælkendur um landið sum løgtingsmaður og landsstýrismaður í tilsamans 28 ár.

Signar er útbúgvin lærari á Føroya Læraraskúla í 1969 og var fyrst lærari á Strondum í fýra ár.

Síðan hevði hann fast starv í Fuglafjarðar Skúla í mong ár. Hann var eisini skúlaleiðari í styttri skeið á Eiði, í Leirvík og í Vestmanna.

Signar kom sum 25 ára gamal á ting í 1970 fyri Tjóðveldisflokkin í Eysturoynni. Hann var tingmaður til 2002, tá hann ikki stillaði uppaftur, tó árini 1980-84 undantikin. Hann var landsstýrismaður í fleiri umførum: 1989-90, 1993-94 og 1998-2000.

Av øðrum álitisstørvum kann nevnast, at hann var limur í Landsskúlaráðnum í 12 ár og í Mentanargrunninum í 16 ár, umframt at hann eisini hevur verið býráðslimur í Fuglafirði.

Eisini er hann ítróttarmaður og spældi við á 1. liði hjá ÍF í mong ár.

Signar hevur víðan sjónarring og hevði tí eisini sum politikari áhuga fyri øllum samfelagsmálum, men serligan áhuga hevði hann fyri skúla- og mentanarmálum. Hesi mál umsat hann í fleiri umførum sum landsstýrismaður. Útbyggingin av studenta- og handilsskúla á Kambsdali var eitt av hansara hjartamálum. Í dag er Signar skúlastjóri við Skúlan á Ziskatrøð í Klaksvík.

Signar er sonur Siggu og Jógvan Hansen í Fuglafirði. Hann er giftur við Gunnvør av Skipanesi, dóttir, Marin og Andreas Skipanes. Gunnvør og Signar eiga børnini: Hans David, Marin og Jógvan Andreas og umframt ommu- og abbabørn.

*-red*




# Framsýning í Smiðjuni

Í dag, fríggjadagin 12. februar kl. 16.00, letur ein málingaframsýning hjá kvøldskúlanæmingum hjá Arngerð Joensen upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Á framsýningini eru naturalistiskir og abstraktir málningar eins og collagur.

Framsýningin er : Fríggjadagin frá kl.16-18.00, leygardagin frá kl.14-18 og sunnudagin frá kl.14-18.

# Svenning og Poul í Danmark

Føroysku møtini, sum Malta í Hirtshals skipar fyri í Suðurjyllandi, verða hetta vikuskifti.

Poul Færø og Svenning av Lofti eru aftur á ferð í Danmark og koma at luttaka á møtunum. Teir verða við bæði í Esbjerg, Sønderborg og Vejle. Hans Jákup á Lava verður við á øllum møtunum, og við sínum eyðkenda guitarspæli kemur hann at leiga felagssangin. Bjóðað verður til hugnaliga samveru eftir hvørt møti, har ein drekkamuður verður við onkrum afturvið. Um onkur ynskir eina samtalu um andalig viðurskifti ella forbøn, so eru Poul og Svenning til reiðar at tæna á tann hátt.




Svenning og Poul komu til Danmarkar seinasta mikudag, og longu mikukvøldið vóru teir við til húsmøti í Horsens í Miðjyllandi, sum føroysku hjúnini úr Vági, Malan og Alexandur Wilhelm, høvdu bjóðað inn til. Alexandur sigur, at ætlanin er at skipa fyri regluligum føroyskum møtum í Horsens. Tað búgva fleiri føroyingar í Horsens og har rundan um. Malan og Alexandur fluttu við familjuni til Horsens fyri eini tíð síðani. Poul og Svenning siga, at teirra ørindi eisini er at vitja føroyingar, búsitandi í Danmark, og vóna at kunna vitja fleiri. Um onkur ynskir eina vitjan av teimum, ber til at seta seg í samband við okkum á Malta. Vit heita á tykkum heima, sum kenna føroyingar á hesum leiðum, um at boða teimum frá møtunum.

## Til Noregs

Týsdagin 16. februar fara teir við ferju úr Hirtshals til Stavanger, og fara beina leið til Karmoynna, har teir hava møti mikukvøldið 17. Dagin eftir gongur leiðin til oynna Bomlø, sum ikki liggur langt frá Karmoy. Har búgva fleiri føroyingar, sum teir hava bjóðað til møti hóskvøldið. Fríggjakvøldið verða teir í Hovshered, sum liggur norðanfyri Flekkefjord. Har koma teir at hava møti í einum sokallaðum Bedehus.

Leygardagin, 20. februar, gongur leiðin úr Noregi og aftur til Hirtshals. Sunnudagin, 21. februar, verða teir til bæði møtini á Malta í Hirtshals. Um onkur vil vita meiri um møtini sunnanfyri ber til at ringja á hesi telefonnummur: 98944370 / 30589644 / 228314 (fø.)

Skráin fyri møtini: Fríggjakvøldið 12. februar kl.19.30 í Esbjerg, Spangsbjerg Møllevej 16c Mølleparken, dk-6715 Esbjerg N. Í Sønderborg leygarkvøldið 13. februar kl.19.00 Missjonshuset, Møllegade 9 dk-6400 (breyðbróting í somu hølum sunnumorgunin 14. feb. kl.10). Sunnudagin 14. februar kl.17.00 í Vejle. Staldgaardsgade 4. dk-7100 (í hølunum hjá Frelsunarherinum, breyðbróting kl.16.00 í somu hølum).

*Poul Jóhan Djurhuus*
*gjaranes@olivant.fo*

Lesið Sosialin so eru tit við